

# JENSINUSA

## Ein somaliari, tveir elefantar og ein gestablíður føroyingur

Sveittandi, eftir at hava súkklað við tveimum FAKTA-posum, skuldi eg inn til mín lokala pakistanara eftir eini vikublaðsdosis av uppskriftum, sum eg aldrin fari at royna, kostráðum sum eg kvalist av og obligatorisku greinini "Min hest fik mig til at elske livet", við eini mynd av eini smílandi permanentaðari konu í vesti á einum hesti.

Meðan eg pakkaði tað óvæntaða keypið av TIDENS KVINDER í taskuna, við yvirskriftunum "Det mener han i virkeligheden om din krop" og "Er du en vildkat?", kom ein somaliari inn og skuldi hava tveir elefantar. Tvær krónur restaðu í.

"Nå, så jeg tager kun den ene elefant."

"Nej "segði eg, tí mítt gestablíða hjarta vaknaði alt fyri eitt. "Du kan få to kroner."

Glaður og bilsin segði hann:

"Jeg kan se på dine øjne, at du er en god menneske."

Bangin fyri at læra hann at kenna, svaraði eg:

"Nå, det var bare to kroner!"

Beinanvegin svaraði hann mær:

"Nej, du er en meget god menneske. Hvis jeg kende dig, jeg invitere til mad."

Enn meira bangin fyri at hann var ein óútrokniligur somaliari við ljótum baktankum, svaraði eg:

"Nej, det skal du ikke tænke på, det var bare to kroner."

"Nej, du er en god menneske" bleiv hann við "jeg får din telefonnummer, så jeg ringe og invitere mad."

Bangin fyri at hann var úti upp á okkurt, fór at ganga aftan á mær ella vildi giftast, svaraði eg:

"Nej, nej, det skal du ikke tænke på, jeg, eller vi rejser på mandag og skal giftes."

Við stórum smíli svarar hann:

"Så jeg får din nummer og sige tillykke, når I komme hjem, og invitere hele dine familie til mad!"

Fyri at sleppa av við hann, svaraði eg:

"Vi mødes nok igen, jeg bor lige her i nærheden."

"Tak for det, du er en god menneske, og held og lykke med din brullopp."

Hann fór við elefantunum. Eg misti innkeypsposan á vegin.

Kiwifruktirnar spjaddust á tí keypmannahavnsku gongubreytini. Kundi kanska verið hugnaligt at smakkað somaliskan mat, hitt familjuna hjá honum, men eg ræðist hann so illa, tí hann er innvandrari, júst sum eg.

Klumman



Jensina Olsen
jensina_olsen@hotmail.com

*Poesibók*

# Havi spýggisjúku og skal á tourné í kvøld

"Í mínum arbeiði ber ikki til at leggja seg sjúka. So tá eg blívi sjúk, ilskist eg eitt sindur inn á arbeiðið, skrivar sjónleikarinnan, Marita Dalsgaard, ið júst hevur spælt við í Dollars.fo. Hon hevði sín fyrsta yrkisleiklut í 1989, og hevur spælt alt millum himmal og jørð í 20 ár.



**Marita Dalsgaard**

**Hvat gert tú, tá tú slappar av?**
– Mediteri. Eri saman við familjuni. Fari í bað. Lesi eina bók. Fari til sjónleik. Drekki te. Hugni mær við eini vinkonu. Hyggi eftir einum filmi. Sovi. Orðni havan. Í Føroyum gangi eg ein túr í fjøllunum. Mær dámar best at gera okkurt.

**Hvat er títt mest óhepna karaktertrekk?**
– Fyri meg sjálva: mín naivitetur. Fyri onnur: mítt sjálvsrættvísi.

**Hvat heldur tú vera mest umráðandi at duga?**
– At lurta. Tá uppliva vit nærveru.

**Hvat elskar tú at gera?**
– At lurta eftir stemmingum, kenslum, litum, eftir børnunum, viðleikarum, teksti, tónleiki, gólvinum, tá ið eg skúri tað. Bara at lurta. Tað elski eg. At spæla sjónleik er fyrst og fremst at lurta. Eg elski at spæla sjónleik og eg elski at lurta. Fram um ALT elski eg míni børn. Tey gera meg so rasandi lukkuliga, at eg næstan ikki fái andað.

**Tín størsti brolari?**
– Einaferð var eg ill við ein leikstjóra, ið ikki kom til generalprøva. Til frumsýninginga kom hann og ynskti góða eydnu. Hevði avgjørt ikki at siga nakað, bara senda honum eitt kalt og lættara arrogant eygnabrá. Tað eydnaðist. Men so fór eg út á vesi, har eingin hoyrdi meg. Og har LOYSTI eg av við eiðum og forbannilsum.. inntil eg varðnaðist, at mikroportarin á blusuni var tendraður. Leikstjórin og øll hini høvdu hoyrt hvørt orð í hátalaranum úti í salinum. Men tey hoyrdu meg ikki pissa. Tað er altíð nakað.

**Hvussu er lagið beint nú?**
– Eg havi simpulthen so ilt í høvdinum. Havi spýggisjúku og skal á tourné í kvøld. Í mínum arbeiði ber nærum ikki til at leggja seg sjúka. So tá eg eri sjúk, blívi eg eitt sindur ørg inn á mítt arbeiði.



**Hvønn sært tú upp til í veruliga lívinum?**
– Í løtuni havi eg hug at svara Per Ramsdal, prestin í Brorson kirkjuni á Nørrebro. Hann tekur støðu og vísir ábyrgd í nærumhvørvinum, hann er partur av.

**Nær fært tú kensluna "tey skilja meg slettis ikki"?**
– Ha, ha, ofta í mínum arbeiði..minst einaferð um vikuna.

**Tað síðsta tingið tú keypti?**
– Eina superfeita indigobláa Kronan súkklu til mín stjúkson. Og 4 GB eyka ram til telduna og eitt nýtt internt optiskt drev til mín sjálva.



**Spælir tú nakað ljóðføri/syngur?**
– Eg eri sjónleikari, so mitt instrument eri eg. Mín rødd, kroppur, kenslur, psyka, intellekt, søga osfr. Um tú serliga hugsar um tónleik, so dámar mær væl at syngja.

**Hvat hovdu onnur ikki trúð um teg?**
– Tey, sum hava kent meg leingi siga, at eg eri óvanliga tolin. Kanska er tað nakað, sum er komið við aldrinum. Og at eg eri heimahugnari um ein háls. Um eg ikki NOYÐIST út, eri eg næstan ikki til at dríva út.

**Eitt motto?**
– Einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt.

**Um tú gevur góð ráð, hvussu gert tú so?**
– Ofta eri eg upptikin av EINUM evni í senn. So snúgva ráðini seg um hettar, sum hevur míni aktuella áhuga. Annars velst um støðuna. Er onkur í iva ella í einari truplari støðu, royni eg at lurta, og at orða meg viðurkennandi.

**Hvussu sær eydnan út?**
– Eydnan er mamma, sum við sær ber eitt fleyr av sælu. Mamma eitur Eydna..

**Er okkurt listaverk, sum hevur fest seg í títt minni?**
– Á Museum of Modern Art í New York hongur ein gittari av Picasso. Tú sært hann, tá tú kemur um hornið, í tí tú kemur upp trappurnar. Tá ið eg sá hann, fór ein rembing ígjøgnum meg, sum eg illa kann lýsa í orðum. Eg fór at útbrøla og stóð bara og græt og græt ... veit ikki, hví hann rakti meg soleiðis. Hann er sterkur og viðkvæmur, perfektur og heilt skeivur og andskræmuligur.





**Um tú slapp at siga nakað hart við Føroyar, so hevði tú sagt:**
– Bannið klandri millum politikarar!!!!!